## Færri bøkur

Vit fingu færri nýggjar bøkur á føroyskum í fjør enn í 2005. Í fjør vóru tær 139 í tali ella 30 færri enn árið fyri. Næstan helmingurin, 60 bøkur, vóru týddar úr øðrum málum, og av teimum vóru barnabøkurnar nógv tær flestu. Fagurbókmentirnar vóru 14, men yrkisbókmentirnar eru framvegis tær best umtóktu, og av teimum vóru 40 prosent ævisøgur ella um átrúnað. Ævisøgurnar vóru fleiri í fjør enn nakrantíð fyrr.

## Órealistiskt uppskot

Tað er púra burturvið at geva 16 ára gomlum valrætt og valbæri, heldur tingkvinnan Heidi Petersen. Hon vísir á, at 16 ára gomul eru ikki myndug, og at tað er burturvið at geva 16 ára gomlum rætta til at hava ábyrgd av landinum, áðrenn tey hava ábyrgd av sær sjálvum. Sjálv kallar hon uppskotið hjá Pálli á Reynatúgvi, Torbirni Jacobsen og Miðflokkinum "populistiskar dreingjalótir", sum als ikki eiga at verða lagdar fyri Tingið.

# Norrøna vendi og slapp undan ódnarveðrinum

**Norrøna var á veg til Frederikshavn leygardagin, men skiparin valdi at venda aftur til Bergen.**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*




*Umborð á norsku ferjuni Prinsesse Ragnhild koppaði ein trailari oman yvir fleiri bilar*

Hesin túrurin hjá Norrønu gjørdist ein av teimum drúgvu. Ætlandi kemur skipið aftur á Havnina hósdagin, og tá er næstan ein vika, síðani tað fór avstað.

Ferðin úr Føroyum til Bergen gekk væl, og skipið legði at bryggju har leygarmorgunin klokkan hálvgum sjey. Veðurmenninir høvdu boðað frá illveðri, og tí varð avgjørt at gera skjótt av, so teir kundu sleppa til Frederikshavn, áðrenn hann øtlaði veðrið. Klokkan átta bleiv loyst og kósin sett suðureftir. Siglt varð innanskerðs, men tá skipið hevði ein tíma eftir í Lindesnes, frætti skiparin, Alfred Joensen, at ein ferja hevði slitið í havnini í Frederikshavn, og at Norrøna kundi ikki leggja at har.

- Vit gjørdu so av at venda aftur, og stutt eftir midnátt leygarkvøldið vóru vit aftur í Bergen. Vit sigldu innanskerðs tað mesta av teininum, so tað bilti ikki, greiðir Alfred Joensen frá.

Sjálvur heldur hann, at hann tók ta røttu avgerðina. Norska ferjan Prinsesse Ragnhild hjá reiðarínum Color Line fekk í hvussu er eina ringa ferð úr Hirtshals til Bergen. Ein trailari koppaði á dekkinum og knústi fleiri bilar, og í tollfríu sølubúðini fór alt í smildur.

**12 metrar alda**

Í Bergen hevur veðrið ikki verið so ringt seinastu 13 árini, og tá Norrøna skifti bryggju í morgun, vóru framvegis 25 metrar um sekundið. Í Hanstholm máldu tey 30 metrar um sekundið í gjár, og tá var aldan uttan fyri brimgarðarnar 11,72 metrar høg. Í morgun vóru framvegis 22 metrar um sekundið í Hanstholm og átta metrar høg alda uttanfyri. Men veðurmenninir hava boðað frá einum skáa í morgin, og tá er ætlanin, at Norrøna skal leggja at har.

- So kvika vit okkum, áðrenn tað næsta lágtrýstið kemur, sigur Alfred Joensen.

254 ferðafólk vóru við Norrønu úr Føroyum, men umleið 120 teirra valdu at fara í land í Bergen heldur enn at bíða eftir veðrinum. Teir 167 norðmenninir, sum komu umborð í Bergen, fóru aftur í land, tá skipið kom aftur hagar leygarkvøldið. Hesi ferðafólkini hava fingið tilboð um ein annan túr seinni.

# - Alfred er ein andsøgn

**Bjørn á Heygum, advokatur og fyrrverandi sambandstingmaður, kallar tað eitt paradoks, at Alfred Olsen hevur tikið seg úr samgonguni, samstundis sum hann atkvøður við henni. Bjørn á Heygum minnir tó á, at hetta er politikkur og hevur einki við løgfrøði at gera**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Sosialurin skrivaði um vikuskiftið, at Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, sigur seg hava fingið vissu fyri, at Alfred Olsen atkvøður við samgonguni, hóast hann hevur tikið seg úr henni.

Formaðurin dugdi ikki at svara fyri, um Alfred Olsen reelt var farin úr samgonguni, men hann viðgekk, at talan var um eina undarliga støðu, sum hann málbar seg.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður Javnaðarfloksins, segði, at hann fer at krevja ein fund um málið. Hinvegin hevur Kristian Magnussen, formaður Javnaðarfloksins á tingi, sagt, at hann metir hetta ikki sum ein trupulleika, tí hann heldur ikki, at Alfred Olsen hevur meldað seg upp í andstøðuna, sum hann tók til.

**Í tveimum pørtum**

Bjørn á Heygum, advokatur, var við til at smíða stýrisskipanina á sinni. Harafturat var hann tingmaður Sambandsfloksins frá 1994 til 1998.

Hann metir ikki, at Alfred Olsen løgfrøðiliga hevur gjørt nakað skeivt við at siga seg úr samgonguni, samstundis sum hann varðveitir formanssessin í Rættarnevndini. Advokaturin metir heldur ikki, at hetta er í stríð við andan í stýrisskipanini.

- Hetta er reint politiskt, sigur Bjørn á Heygum, ið annars ikki heldur nógv um støðuna hjá Alfred Olsen.

- Øll hava eitt problem, sum eru í tveimum leirum. Hetta er eitt paradoks, og hongur ikki saman, sigur Bjørn á Heygum, ið minnir á, at Alfred Olsen er komin við eini almennari proklamatión, sum hann kallar tað, um at hann er farin úr samgonguni. Men samstundis sigur Kaj Leo Johannesen, at Alfred Olsen atkvøður við samgonguni.

- Hetta er ein trupulleiki og er ikki frítt fyri at vera ein farca. Hetta er ein spurningur um ordan og disciplin í tí politisku skipanini, heldur Bjørn á Heygum, ið eisini heldur at Tjóðveldisflokkurin hevur ein trupulleika við Karsten Hansen og teimum nevndarsessum, ið hann hevur fingið frá sínum fyrrverandi flokki.

**Trupult at velja nýggjar nevndir**

Tað er nevniliga ikki bara sum at siga tað, at skifta eitt nú formannin í Rættarnevndini úr, sum í løtuni eitur Alfred Olsen. Skal nýggj rættarnevnd veljast, skulu allar løgtingsnevndir veljast av nýggjum. Hinvegin kann Alfred Olsen siga úr seg formanssessinum uttan at allar nevndirnar skulu veljast av nýggjum.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Alfred Olsen um støðu hansara í Løgtinginum, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*- Hetta er ein trupulleiki og er ikki frítt fyri at vera ein farca, sigur Bjørn á Heygum um Alfred Olsen, ið hevur tikið seg úr samgonguni, hóast hann eftir øllum at døma stuðlar henni*